# Regin er nú á sjeynda plássi

MAGNUS DAM



Regin Vágadal liggur nú á einum sjeynda plássi í kappingini um at gerast heimsins sterkasti maður, sum er á oynni Mauritius.

Í gjár var seinni finaludagurin í kappingini, og Regin fekk átta stig tilsamans í teimum báðum kappingunum, sum vóru í gjár.

Tony Dam, venjari hjá Regini Vágadal, sigur at Regin er væl nøgdur við úrslitini, hann fekk í gjár.

Tann fyrsta kappingin fyrrapartin í gjár var at kasta eina vekt so høgt upp í luftina sum gjørligt. Regin hevði góðar vónir til hesa kappingina, tí hann hevði roynt tað áður við góðum úrsliti í Skotlandi. Og tað gekk eisini gott hjá honum í gjár, tí hann endaði á einum triðja plássið í hesi kappingini.

Í hini kappingini gekk ikki líka væl, tí her gjørdist Regin nummar sjey av teimum átta, ið eru við.

Hendan kappingin var at taka eitt tak í tveir bilar, sum stóðu á eini plátu, ið stóð á skrá, og tað var ógvuliga tungt at halda leingi, sigur Tony frá Regini.

Samanlagt liggur Regin nú á einum sjeynda plássi í kappingini, og hann hevur 13 stig.

Finnin Riku liggur á fyrsta plássi, og hevur hann 27 stig, meðan íslendingurin Magnus hevur 23 stig og liggur á øðrum plássi.

Raimonds Bergmanis, sum var í sama bólki sum Regin Vágadal í innleiðandi umførunum og endaði á øðrum plássi í bólkinum, eitt stig aftanfyri Regin, liggur í finaluni á aftasta plássið við seks stigum.

Tað eru fimm stig millum Regin á sjeynda plássi og danan Flemming og Forbes, sum deila fimta og sætta pláss við 18 stigum hvør.

Tony heldur tað ikki vera ómøguligt hjá Regini at vinna inn á hesar báðar í kappingini í morgin og teimum trimum seinastu kappingunum, sum verða sunnudagin.

Kappingin í morgin er at ganga við tveimum tunnum, festar uttast í ein bjálka, so ofta runt sum gjørligt. Hvør tunna vigar 150 kg., men Regin væntar sær eitt hampuligt úrslit í hesi kappingini. Hann hevur roynt hetta í kapping í Skotlandi áður, og har kláraði hann seg betur enn Forbes, ið sum sagt nú hevur 18 stig.

Finnin Riku, ið liggur á fyrsta plássi, er favorittur til at vinna finaluna, og Regin ger sær heldur ongar vónir um at basa hesum sterka finnanum, men sum hann hevur sagt áður, so er hann longu rokkin nógv longur enn hann hevði gjørt sær vónir um. Og so má finnin bara basast eina aðru ferð.

*„Fiska“ framvegis í Lopraholi:*

## Gevast møguliga heilt við boringini

JAN MÜLLER

Vónirnar um at kunna fara undir aftur boringina í Lopra, eftir eitt óhapp í farnu viku, gerast minni fyri hvønn dag, hóast menn enn ikki hava givið skarvin yvir.

Tað var í farnu viku, at borurin bráddliga stóð fastur meira enn 3000 metrar niðri í undirgrundini. Alla vikuna hava sermenningar frá einum útlendskum felag roynt at „fiska“ boristrongin upp.

Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas sigur, at tað hevur eydnast at fáa ein stóran part av stronginum upp, men enn situr eitt fitt petti eftir har niðri.

Teir fara at royna at „fiska“, soleiðis verður hetta nevnt á oljumáli, restina av boristronginum upp í eitt samdøgur afturat tvs. til einaferð leygardagin.

Tá er so undir øllum umstøðum ætlanin at gera tær ætlaðu boriholsmátingarnar, sum skuldu gerast, tá boringin endaði. Tað fer so at geva feløgunum tíð til at umhugsa, um tey skulu gevast nú. Tann avgerðin verður so tikin eftir vikuskiftið.

Sosialurin skilur, at skulu teir brúka nógv meira tíð til at fáa restina av boristronginum upp, so fer hetta at krevja meiri pengar. Tað verður so upp til oljufeløgini at gera av. Óvist er um vilji er til tess.

-Onkunstaðni mugu vit steðga, annars kann tað gerast til eitt botnleyst hol, sigur Arne Rosenkrands Larsen.




Posar, bustir og slangur til flest allar dustsugvarar
DULAMENN



# *Jóan Jakku Skósøla*

*Vit hava selt skógvar í 73 ár – mánadagin 30. september er seinasti dagur, ið vit hava opið.*

*Vit hava øll hesi árini havt viðskiftafólk úr øllum Føroyum – líka úr Sumba til Viðareiðis og úr Fugloy í Mykineshólm – og nýta her høvið til at takka fyri gott samstarv øll hesi mongu ár.*

*Vit vilja eisini takka teimum mongu, góðu og trúgvu starvsfólkunum, sum hava verið hjá okkum øll hesi árini.*

*Jóan Jakku Skósøla*

